TÍÐINDI

# 974 TIKIN FYRI AT

## FERÐSLA Talið á teimum, sum verða tikin fyri at koyra ov skjótt, er munandi økt seinastu árini, sigur Løgreglan

Áki Bertholdsen

Í fjør vórðu heili 974 bilførarar tiknir fyri at koyra ov skjótt.

Tað vísir ein uppgerð, løgreglan hevur gjørt um ferðsluna í Føroyum.

Hetta er nógv meiri enn árini frammanundan.

Uppgerðin hjá løgregluni vísir, at í 2011 vórðu 610 bilførarar tiknir fyri at koyra ov skjótt og í 2010 var talið 389 bilførarar.

Í 2009 vórðu 637 bilførarar tiknir fyri at koyra ov skjótt og í 2008 var talið 412 bilførarar.

Hetta eru bilførarar, sum løgreglan hevur tikið og skuldsett fyri at koyra ov skjótt.

### 15 koyrikort

Av teimum 974 ferðsyndarunum, sum vórðu tiknir í fjør, fingu 499 bilførarar klipp í koyrikortið og 211 mistu koyrikortið treytað. Tað merkir, at teir skulu upp til nýggja koyriroynd.

Men so vóru tað eini 15 bilførarar, sum mistu koyrikortið.

Annars vóru tað 249 bilførarar, sum fingu bót í fjør fyri at koyra ov skjótt.

Tað merkir, at teir koyrdu skjótari enn loyvt er, men ikki so skjótt, at teir fingu klipp í koyrikortið, ella mistu koyrikortið.

Tann sum koyrir persónbil 21 km/t til 30 km/t skjótari enn loyvt fer, fær klipp í koyrikortið, men tann, sum koyrir meiri enn 31 km/t til 50 km/t skjótari enn loyvt er, missa koyrikortið treytað.

Bilførarar í lastbili ella



størri bussum, skulu bara koyra 16 km/t skjótari enn loyvt er, fyri at fáa klipp í kortið.

Tann, sum koyrir skjótari enn 51 km/t meiri enn loyvt er, missur koyrikortið.

Karl Leonson, ferðslupolitistur, staðfestir, at tølini eru tað er ógvuliga ymiskt, hvussu nógv verða tikin ár um ár.

Men hann staðfestir samstundis, at talið á teimum, sum verða tikin, hevur beinleiðis samband við, hvussu nógv løgreglan ger við at kanna ferðsluna.

– Hesi seinastu árini hava vit raðfest arbeiðið at kanna ferðsluna rættiliga ovaliga og tað sæst aftur í tølunum, sigur politisturin.

Hann sigur, at tølini skulu tískil ikki skiljast soleiðis, at føroyingar eru farnir at koyra villari enn teir plagdu.

**Tikin fyri ikki at brúka trygdarbelti**

| | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| BÓT | 293 | 343 | 654 | 430 | 243 |
| KLIPP | 53 | 85 | 134 | 86 | 56 |
| TILS. | 346 | 428 | 788 | 516 | 299 |

*Hendan talvan vísir, hvussu nógv eru tikin hesi seinastu árini fyri ikki at brúka trygdarbelti í bili. Enn verða nógv tikin, men gongdin er tann rætta og somuleiðis fáa færri bilførarar klipp í koyrikortið fyri at hava børn í bilinum, uttan at spenna tey í trygdarbelti. Revsingin fyri at sita í bili í ongum trygdarbelti er bót, men sita børn leys í bilinum, kostar tað bilføraranum eitt klipp í koyrikortið.*




### Gongur rætta vegin

Samstundis sum nógv fleiri bilførarar verða tiknir fyri at koyra ov skjótt, eru tað nógv onnur ferðslubrot, har tølini ganga tann rætta vegin, ella í hvussu so vaksa tey ikki.

Í fjør vóru annars 742 ferðsluóhapp fráboðað løgregluni og tað er væl minni enn árini frammanundan.

Sama gongdin er viðvíkjandi øðrum ferðslubrotum, tí talið á teimum, sum eru tikin fyri at koyra ávirkað av rúsdrekka, rúsevnum ella heilivági, stendur í stað, ella er minkað eitt sindur.

Samstundis er talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða eisini munandi fallið seinastu árini.

Í 2008 vóru 83 ferðsluóhapp við fólkaskaða, men er

**Tikin fyri koyra ávirkað av rúsdrekka, rúsevnum ella heilivági**

| | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Rúsdrekka | 80 | 83 | 83 | 110 | 120 |
| Rúsevni/Heilivágur | 8 | 4 | 0 | 4 | 3 |
| Tils. | 88 | 87 | 83 | 114 | 123 |

*Hendan talvan vísir, hvussu nógvir bilførarir verða tiknir fyri at koyra ávirkaðir, Gongdin er, at talið er lækkandi*

# Vit skulu røkka null-hugsjónini í ár

Tað er gleðiligt, at gongdin er tann rætta vegin á nógvum økjum, sigur stjórin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

– Vit kunnu ikki annað enn fegnast um, at á summum økjum gongur rætta vegin í ferðsluni.

Tað heldur Brynhild Høgnadóttir Joensen, stjóri í Ráðnum fyri ferðslutrygd.

Hon fegnast um, at talið á teimum, sum verða tikin tí at tey ikki brúka trygdarbelti lækkar og at gongdin í rúsdrekkakoyring eisini er tann, at tølini eru lækkandi.

Hinvegin eru næstan 1000 bilførarar tiknir fyri at koyra ov skjótt og samstundis verða fleiri hundrað tikin fyri at tosa í fartelefon ímeðan tey koyra.

– Hetta vísir okkum, at enn er serstakliga langt eftir á mál.

### Broyta hugburð

Hon sigur, at ferð er orsøkin til nógv óhapp og nógvar vanlukkur, men tíverri vísti ein Gallup-kanning hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, at stórur partur av føroyingum ásannar, at teir koyra ov skjótt – og enntá halda, at tað er ílagi.

Hon sigur, at tað er



neyðugt, at fáa fólk at broyta hugburð í sambandi við fartelefon og ferð, og hesi bæði fyribrigdi verða eisini málið fyri fleiri átøkum hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd í næstum.

Sjálv vónar Brynhild Høgnadóttir, at fólk fara at broyta hugburð til ferð, akkurát, sum fólk hava broytt hugburð til rúsdrekkakoyring.

– Tað eru ikki so nógv ár síðani at tú kundi hoyra bilførarar reypa av, at teir hava koyrt við kenning. Í dag er tað vanærilig skomm og tað er hendan hugburðin, vit vilja hava til tað at koyra ov skjótt, sigur hon.

### Null í ár

Annars er hennara nýggjársynskið, at í ár skal tað verð, at vit røkka null-hugsjónini og at ongin skal doyggja í ferðsluni í ár.

Í fjør doyðu trý fólk í ferðsluni, men annars er eitt fólk deytt í ferðsluni nú í nøkur ár.

– Tað er ikki langt frá einari deyðsvanlukku, niður í onga, so vit trúgva uppá, at tað kann lata seg gera.

Men hon sigur, at í hesum sambandi eiga vit framvegis at leggja dent á at minka vandarnar av teimum fýra stóru syndarunum í ferðsluni: Ferð, selar, spritt og gáloysni.

Tað eru hesi fýra fyribrigdini, sum onkusvegna eru orsøkin til nógv tær flestu óhappini og tær flestu vanlukkurnar, so fáa vit broytt hugburðin á hesum økjum, eru vit komin langt, heldur stjórin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

TÍÐINDI

# KOYRA OV SKJÓTT




**LØGREGLAN**

*Í fjør gjørdi løgreglan nógv burtur úr at kanna ferðsluna og tað sæst aftur í tølunum yvir, hvussu nógv verða tiknir fyri ymisk ferðslubrot. Men á summum økjum er gongdin tann rætta*

## » Talið á teimum, sum verða tikin, hevur beinleiðis samband við, hvussu nógv løgreglan ger við at kanna ferðsluna

støðugt minkað og í fjør var talið komið niður á 38 fólk, sum fingu skaða í ferðsluóhappum.

Hvørt ár eru tað eisini onkrir einstakir bilførarar, sum elva til ferðsluóhapp, og sum rýma av staðnum, men sum verða tiknir aftur aftaná.

Hinvegin doyðu trý fólk í ferðsluni í fjør. Tað talið hevur verið støðugt lækkandi, tó at tey broytast frá ári til ár og vit skulu ikki longur aftur enn til 2007, tá ið sjey fólk doyðu í ferðsluni.

*aki@sosialurin.fo*

### Tikin fyri at tosa í fartelefon

| 2012 | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|---|
| 516 | 360 | 497 | 249 | 160 |

*Hendan talvan vísir, hvussu nógvir bilførarar eru tiknir seinastu árini fyri at tosa í fartelefon ímeðan teir koyra bil. Løgreglan og stjórin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd halda, at bøturnar eru ov lágar*

| Ár | Bót | Klipp | Treytað frádøming | Treytaleys frádøming | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|
| 2012 | 249 | 499 | 211 | 15 | 974 |
| 2011 | 268 | 222 | 113 | 7 | 610 |
| 2010 | 217 | 107 | 60 | 5 | 389 |
| 2009 | 274 | 246 | 105 | 12 | 637 |
| 2008 | 159 | 183 | 64 | 6 | 412 |

*Hendan talvan vísir, hvussu nógvir bilførarir eru tiknir fyri at koyra ov skjótt hesi seinastu árini. Árið í fjør setir met, men løgreglan sigur, at hetta er tí, at tey hava gjørt nógv meiri burtur úr at kanna bilar, enn tey hava gjørt árini frammanundan*

## Sæst aftur beinanvegin

Áki Bertholdsen

– At nógv fleiri bilførarir verða tiknir fyri at koyra ov skjótt nú, merkir ikki tað sama sum at føroyingar eru blivnir villari í ferðsluni.

Tað staðfestir Karl Leonson, ferðslupolitistur.

Hann heldur tvørtur ímóti, at hetta skal eina og aleina takast sum eitt beinleiðis úrslit av, at løgreglan hevur gjørt nógv meiri við at kanna ferðsluna, enn hon hevur gjørt árini frammanundan.

– At gera ferðkanningar, og at kanna um bilførarar tosa í fartelefon ímeðan teir koyra, hava verið tvey øki, vit hava lagt stóran dent á seinastu tíðina og tað sæst beinanvegin aftur í hagtølunum.

Tí kemur tað í grundini ikki so óvart á hann, at talið á teimum, sum verða tikin fyri hesi lógarbrot, er munandi hækkað.

Og hann leggur afturat, at ætlanin er at halda fram í sama spori í ár og longu nú hava yvir 20 bilførarar fingið klipp í koyrikortið av ymsum orsøkum.

### Bíða í nøkur ár

Samstundis sum at løgreglan er farin at gera meiri burtur úr at kanna ferðsluna, hevur eisini Ráðið fyri Ferðslutrygd skipað fyri fleiri átøkum fyri at fáa bilførarar at vísa størri ansni í ferðsluni.

Átøk hava verið fyri at fáa bilførarar at minnast til trygdarbelti og fyri fáa okkum at ansa betri eftir, tá ið vit koyra.

Tað er ilt at siga, hvørja ávirkan, hesi átøkini hava havt, men Karl Leonson heldur, at tað er neyðugt at bíða nøkur ár, áðrenn vit kunnu koma til nakra niðurstøðu.

– Viðurskiftini í Føroyum eru so smá, at beinanvegin løgreglan leggur størri orku í at kanna ferðsluna, sæst tað aftur, og tað sæst eisini beinanvegin aftur, tá ið Løgreglan raðfestir aðrar uppgávur.

Tí heldur politisturin, at skulu vit fáa eina samanhangandi mynd, er neyðugt




at raðfesta hesi viðurskifti í nøkur ár á rað.

Men kortini sæst, at hóast løgreglan hevur lagt størri orku í at kanna ferðsluna, er talið á teimum, sum ikki brúka trygdarbelti, lækkað og somuleiðis er talið á teimum, sum verða tikin fyri rúsdrekkakoyring, sum heild, lækkandi.

### Bótin høskandi

Sum Karl Leonson sigur aðrastaðni her á síðunum, heldur hann, at bótin fyri at tosa í fartelefon, er alt ov lá.

Hinvegin heldur hann, at revsingin fyri at koyra ov skjótt er passalig.

Í Føroyum er skjótari at missa koyrikortið, enn í Danmark, men afturfyri eru bøturnar í Danmark hægri enn í Føroyum.

Tann, sum verður tikin fyri at koyra 111 kilometrar um tíman í óbygdum øki, missur koyrikortið og fær 2000 krónur í bót omaná.

Tann, sum koyrir 101 kilometrar um tíman í bygdum øki í Føroyum og missur koyrikortið treytaleyst, fær 4500 krónur í bót afturat.

Koyrir tú 60 í bygdum øki, sum er 10 km/t skjótari enn loyvt, er bótin 1000 krónur, men koyrir tú 95 úti í óbygdum, sum er 15 km/t skjótari enn loyvt, er bótin 500 krónur.

– Hetta er fyri at staðfesta, at tað verður ikki góðtikið at koyra skjótt í bygdum øki og tískil skal tað revsast serliga harðari, sigur Karl Leonson.

## Vilja hava hægri bót

Bótin fyri at tosa í fartelefon ímeðan ein korir bil, eigur at verða nógv hægi, heldur løgreglan.

Tað kemur alt ov ofta fyri, at bilførarar verða tiknir fyri at tosa í fartelefon ímeðan teir koyra.

Í fjør tók løgreglan heilar 516 bilførarar kring alt landið fyri at tosa í fartelefon ímeðan teir koyrdu bil.

Tað er nógv fleiri enn fyri nøkrum árum síðani, tí í 2008 vórðu 160 bilførarar tiknir fyri at tosa í fartelefon.

Karl Leonson, politistur, torir ikki at siga um ørsøkin til vøksturin er, at bilførarar eru blivnir herviligari at tosa í fartelegfon nú, enn teir vóru fyri nøkrum árum síðani.

Heldur er hann av teirri áskoðan, at orsøkin til, at fleiri eru tikin fyri hetta lógarbrotið, er, at løgreglan hevur gjørt nógv meiri fyri at kanna bilførarar hesi seinastu árini.

– Hesi síðstu árini hava vit raðfest tað ógvuliga frammaliga at kanna, um bilar koyra ov skjótt og um bilførarin tosar í telefon ímeðan teir koyra.

### Bótin ov lág

Men politisturin heldur kortini samstundis, at tað ger næstan ikki mun til, hvussu ofta bilførarar verða tiknir fyri at tosa í fartelefon ímeðan teir koyra bil, tí tað sær ikki út til, at teir leggja nakað í tað og taka betri partar fyri seg.

Men Karl Leonsson ivast ikki í, at ein orsøk til at bilførarar ikki leggja nakað í tað, er, at revsingin er alt ov lág.

Revsingin, bilførarar fáa fyri at tosa í fartelefon ímeðan teir koyra, er ein bót upp á 500 krónur.

– Tað ger ikki mun, tí vit síggja somu bilførarar aftur og aftur tosa í telefon.

– Tað er ein bót, sum er alt ov lág til at bilførarar leggja nakað í tað.

Politisturin vísir á, at í Danmark fær bilførari 1500 krónur í bót fyri at tosa í fartelefon ímeðan hann koyrir.

Hann heldur avgjørt, at bøturnar í Føroyum eigur at hækka til nakað, sum líkist bótunum í Danmark.

Hann heldur, at talið á teimum, sum verða tikin fyri hetta ferðslubrotið, eigur avgjørt at vísa politiska myndugleikanum, at bøturnar eiga at hækka.

### Ein gongd leið

Brynhild Høgnadóttir, stjóri í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, er samd í, at ein gongd leið kann vera at hækka bøturnar.

Hon leggur dent á, at í Ráðnum fyri Ferðslutrygd, hava tey ikki viðgjørd spurningin so gjølliga, at tey eru komin til eina niðurstøðu.

Men sjálv heldur hon, at tað kann vera ein gongd leið at hækka bøturnar.

– At sita og skriva og lesa sms, ella tosa í fartelefon, ímeðan ein koyrir bil, er ein beinleiðis deyðsfella, tí tað ber ikki til at gera bæði í senn.

Annars eru tað summi sum halda, at tað eigur at geva klipp í koyrikortið at tosa í fartelefon ímeðan ein koyrir bil.

Men tað er ikki semja um tað, tí tað reisir nógvar aðrar spurningar.

Er tað vandamiklari at hava telefon í hondini enn at sita við einum ísi, ella onkrum øðrum etandi í hondini?

– At tosa í fartelefon ímeðan ein koyrir bil, er at vísa gáloysni í ferðsluni á jøvnum føti við so nógv annað og tað kann rættiliga skjótt enda galið, heldur Brynhild Høgnadóttir.